


***Nr. 21*** ***13. oktober 2013*** ***73. árg.***

# Í LJÓSINUM ER HEILSUBÓT

*Komið og síggið ein mann, sum hevur sagt mær alt, sum eg havi gjørt.*
*Jóh. 4,29.*

Hann veit alt um okkum, og um hann gav okkum, eftir sum vit høvdu uppiborið, læt hann okkum fara til grundar. Hann veit, hvar vit búgva, og ongin fær krógvað seg fyri honum. Hann kennir okkum til botns, og alt stendur uppskrivað í Harrans bók. Allir teir spiltu møguleikarnir, tær nógvu ferðirnar, vit forsømdu at handla, øll tey eitrandi orðini og óndu tankarnir og vantrúgvin, onki er gloymt.

Kennir tú til at verða innheintaður av hesum sannleikanum: Hann finnur meg – um ikki fyrr, so á seinasta vegamótinum. Hvat skal eg gera?

Einastaðni stendur skrivað: ”Tann, sum ger sannleikan, kemur til ljósið. **Ger** sannleikan – tað ljóðar løgið. At gera sannleikan merkir at innrætta seg eftir tí, sum man er sannførdur um. At gera sannleikan er treytaleyst at vera lýðin. Men tað vilja vit ikki. Vit leypa til viks og fjala okkum. Tí koma vit ikki til ljósið. Vilja vit náa á eitt mál, mugu vit ganga vegin, sum førir á málið.

Samariukonan gloymdi vatnkrukkuna við brunnin og rann inn í bygdina at avleggja vitnisburðin: Hann hevur sagt mær alt, sum eg havi gjørt. Soleiðis gongst, um sannleikin tekur okkum til fanga. Brádliga er bara eitt mál á skránni, men tað er so týdningarmikið, at alt annað má rætta seg eftir tí.

At nógv liva í skýming, kemst av, at tey ikki vilja lata sannleikan avdúka seg. Tí koma tey ikki til ljósið. Hvussu skulu tey kunna tað, um tey flýggja burtur frá ljósinum? Í dag skal tað prentast inn í hjarta títt: Hann veit alt um teg, og tú kanst ikki fjala teg. Hann

veit, at í sálardýpi tínum er ein longsul eftir at koma til ljósið. Tí er vón. Eisini fyri teg. Lurta eftir Jesu orðum, hóast tey døma teg. Í ljósinum er heilsubót.

*Tí komi eg aftur nú, faðir,*
*til tín, sum í ljósinum býrt,*
*tú kavahvít keypti mær klæðir,*
*at skoða eg skal tína dýrd,*
*og alt, sum eg inti á sinni,*
*tú leggur tær ikki í minni,*
*TÍ KROSSFEST ER SKULDABRÆV MÍTT.*

# Dávid

*Sí, til sannleiks í hjartadýpi er hugur tín. Sálmur 51,8.*

Undarligt er, at Dávids sálmar eru so týdningarmiklir fyri okkum, tá ið vit hava í huga, at hann var maðurin, sum fall so djúpt í synd. Men veruleikin er tann, at tá ið okkum tørvar fyrijáttanir Guds ríkis, blaða vit vanliga í Dávids sálmum.

Hetta eru júst teir sálmarnir, sum prentaðir verða í smáhefti av Nýggja Testamenti – Sálmarnir, sum ein stórur syndari hevur skrivað.

Hví verður soleiðis gjørt? Tí Dávid var av sannleikanum! Í 51. Sálmi síggja vit, at Dávid roynir hvørki at bera í bøtiflaka fyri synd sína ella pynta hana og djúpa fall sítt.

Hann nevnir syndina við røttum navni fyri Guds andliti, tá ið hann biður um fyrigeving. Tí kundi Harrin fyrigeva honum av øllum hjarta sínum, og tí gjørdist Dávid maðurin eftir Guds hjarta.

So er eisini vón fyri okkum vesalu og óverdigu menniskjum, tá ið vit fegin vilja vera av sannleikanum og biðja hin livandi Gud um fyrigeving.

*t.* trýddi.

# Herskapshús - harragarður

Í Jóh. 14,2 stendur í føroysku Bíbliuni: Í faðirs míns húsi eru mangir **bústaðir.**” Í ensku King James stendur: In my Father’s House are many **mansions**, og mansions verður á donskum umsett til herskabshus, palæ, patriciervilla, og á føroyskum til stórmanshús. Í 1. Kor. 2,9 lesa vit: “Tað, sum eyga ikki sá, og oyrað ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað, sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann.” So gleð teg!

*e.c.* umsetti.

# Styðja tær lyftu hendurnar hjá presti tínum

*"... eg skal geva tykkum hirðar eftir hjarta mínum." Jer. 3,15.*

Her koma nøkur døpur hagtøl: Meir enn 50 % av teimum, sum átaka sær eina tænastu í meinigheitini, gevast eftir 10 árum, av tí at tey falla í fátt. Ansa eftir, at tað ikki hendir presti tínum. Royn at síggja hetta fyri tær: Hermenninir hjá Jósva eru niðri í dalinum, har teir stríðast móti amalekittunum. Høgt uppi yvir teimum situr Móses á einum fjallatindi við hondunum hevjaðum móti himli. So leingi, sum armar hansara eru hevjaðir, vinna teir. Um tú nakrantíð hevur roynt at hildið hondunum uppi nokk so leingi, veitst tú eisini, at tú skjótt møðist og letur hendurnar falla. Ísraelsmenn taptu, so títt og knapt Móses læt armarnar falla. Tí styðjaðu Áron og Hur hendurnar hjá Mósesi, og tá vendi krígseydnan, og Ísrael vann. Tað snýr seg ikki bara um evnini hjá Jósva sum herovasta, tí tær lyftu hendurnar vunnu slagið fyri tann dagin. Áron og Hur sóu til, at oddamaður teirra ikki fall saman, og tí varð øll tjóðin frelst. "… eg eri Harri tykkara, og eg skal taka tykkum, ein úr hvørji borg og tveir úr hvørji ættargrein, og flyta tykkum aftur til Zions; og eg skal geva tykkum hirðar eftir hjarta mínum, sum skulu røkta tykkum við hyggindum og skynsemi." Jer. 3,14-15.

Um Gud hevur givið okkum ein prest, sum elskar okkum, leiðir okkum og mettar sál okkara, skulu vit styðja hann. Styðja tær lyftu hendur! Í tabernaklinum í Gamla Testamenti skuldu ljósini í stakunum brenna dag og nátt, av tí at tey umboðaðu Guds nærleika hjá fólki sínum. Um eitt ljós so mikið sum blaktraði, komu útvaldir tænarar beinanvegin og fyltu meira olju á og fingu ljósini at brenna við røttu glóðini.

Skilir tú meiningina? Tað er tín ábyrgd, at ljósið í kirkju tíni ikki blaktrar, og at eldurin á prædikastólinum ikki fánar burtur. Bið tí hvønn dag fyri presti tínum, og syrg fyri at líva hann upp og stuðla honum, hvørja ferð tú fært høvi til tess."

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

## Seinastu orð Brorsons

Stutt áðrenn sálmaskaldið Hans Adolf Brorson andaðist, segði hann: „Mín frelsari biður fyri mær í himlinum og ger mær eitt stað til reiðar í ríki sínum. Ja, mín frelsari, kom skjótt eftir mær!"

*t.* týddi.

# Grammi gudloysingurin

*”Tín dári! Í hesi nátt verður sál tín heimtað av tær.” Luk. 12,20.*

Ein grammur tápulingur. Jesus segði eina søgu um ein virkisfúsan bónda, sum segði: ”Eg vil bróta niður løður mínar og byggja aðrar størri.” (vers 18) Hann var ivaleyst ein góður handilsmaður og dugnaligur at leggja ætlanir; men so segði hann: ”Og eg vil siga við sál mína: ”Sál, nú hevur tú mikið góðs og fæ niður fyri til mong ár; hvíl teg nú, et og drekk og ver glað!” Men Gud segði við hann: ”Tín dári! Í hesi nátt verður sál tín heimtað av tær; og hvør skal tá fáa tað, sum tú hevur vunnið?” Soleiðis gongst tí, sum savnar sær ríkidømi og ikki er ríkur í Gudi.” (vers 19-21)

Hesin maður hevði eina ætlan fyri lívi sínum, men hann hevði onga ætlan lagt fyri ævinleikan. Hann hugsaði um seg sjálvan, men ikki um Gud. Hann legði stóran dent á kropp sín, men ikki á sál sína.

Sagt verður, at ein miðal mannakroppur rúmar nóg mikið av fosfori at gera átta hundrað svávulpinnar, av sukri nóg mikið til trýss sukurmolar, av salti upp í tjúgu fullar skeiðir og nóg mikið av jarni at framleiða seymir fyri umleið hundrað krónur. Restin er bara dust og vatn.

Um tú forvenur, stuðlar og verjir henda partin av tær, sum bert er ætlaður at liva í 60 – 80 ár, og misrøkir tann partin, sum skal liva víðari annaðhvørt í Himli ella í Helviti, sigur Gud, at tú ert ein dári. Hesin maðurin bilti sær inn, at hann fór at liva í mong ár aftrat; men Gud segði, at hesa somu nátt fór hann at krevja sálina frá honum.

Hevur tú ikki fatað, at ein vanlukka, ein blóðtøppur, eitt váðaskot, eitt flogfar við motorskaða ella ein rúsaður bilførari eftir ongari tíð kann gera enda á tær? Hugsa teg um! Tað er ikki ein spurningur, um tú fert at doyggja – spurningurin er, nær tú skalt doyggja. Ert tú til reiðar at møta Gudi?

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað stendur í Bíbliuni, at Harrin frøist um meg. “Hvussu stórliga frøist hann ikki um frelsu tína.” Sálmur 21,2.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. okt. | Tekstur: | Jóh. 15,1-8 og Gal. 5,22-23; | bíbliuorð: | Jóh. 15,5 |
| 20. okt. | Tekstur: | 2. Kong. 5,1-14; | bíbliuorð: | Róm. 10,15 |
| 27. okt. | Tekstur: | Matt. 28,18-20; Áps. 10,1-8 og 34-35 og 39-43; | bíbliuorð: | Matt. 28,19a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74